SOSIALURIN

Framhald frá 1. síðu (1)

Hópur av ungum mótmælismonnum stóðu á nýggja pierinum og kvettu trossarnar á »Aldershot«, sum síðan fór frá og legði seg uttaná »Northern Son« á oljubryggjuni.

Mótmælismenninir hildu síðan yvir á oljubryggjuna og kvettu fremsta trossan á »Northern Son«. Tá eydnaðist løgregluni at fáa tamarhald á mótmælismonnunum.

Um 10-tíðina hóskvøldið avgjørdi skiparin á »Aldershot« at fara inn á Skála at fáa skaðan umvældan. Har møtti bretski trolarin ongari mótstøðu, og verður skaðin umvældur á Skála Skipasmiðju. Ein fyribils umvæling av skaðanum á »Aldershot« er mett at kosta um 30.000 kr.

Hvør stóð aftanfyri?

Frá ungfólki, ið luttók í mótmælisgonguni á vestaru bryggju seinasta hóskvøld, frætta vit, at blaðstjórin Ólavur Michelsen og løgtingsmaðurin Erlendur Paturson, ið eggjaðu ungfólkum at fremja tiltakið, sjálvir stóðu aftastir í mótmælisgonguni.

Hetta er eisini í samljóð við tað, sum 14. SEPTEMBER, skrivar seinasta hósdag, har spurt varð: sleppa teir at? Hvør skal siga, ætla tit ikki at luttaka í eini slíkari mótmælisgongu?

Framhald frá 1. síðu. (2)

hava bókmentarligt virði og at verða virðisløgnarvert. Bæði fagrar bókmentir og yrkisbókmentir kunnu fáa virðisløn.

Virðisløgnin, sum skal verða latin í reiðum peningi, er í minsta lagi 3000,- kr. og verða tað tvær virðisløgnir, skal hvør teirra minst verða 3000 kr. Verður ongin virðisløn latin eitt árið, tá onki bókaverk verður hildið virðisløgnarvert, verður peningurin at goyma til at vaksa um virðisløgnirnar eitt annað ár.

Fimmmannanevndin avger hvør ella hvørjir rithøvundar, ið virðisløn skulu fáa. Rithøvundafelagið velur tveir limir í hesa nevnd. Fróðskaparsetrið (setursráðið) velur ein lim og Býráðið velur tveir limir.

Tað verða teir býráðsvaldu limirnir, ið skulu kalla saman til fundar í fimmmannanevndini.

Í uppskotinum verður eisini nevnt, at virðisløgnin verður latin 17. september, ið er føðingardagur M. A. Jacobsens, og er tað býráðsformaðurin, ið skal hnda virðisløgnina.

Sigfried Skaale segði, at virðisløgnin av fyrstan tíð varð sett at verða 1000 kr., síðan 2000 kr., og í triðja lagi varð avgjørt at tvífalda virðisløgnina t. v. s. 2×2000 kr. til ávikavist fagrar bókmentir og yrkisbókmentir. Hann legði aftrat, at rættiliga fáir limir vóru á kassa nevndarfundi, tá málið varð viðgjørt, og ynskti tí, at málið varð beint aftur í nevnd til viðgerðar.

Ólavur Michelsen flutti fram, at tað varð hann, sum formaður í 1958 sendi eina áheitan til býráðið um at lata slíka virðisløn. Tað var Sigfried Skaale, táverandi býráðsformanni fyri at takka, at áheitanin fekk so góða undirtøku í býráðnum. At virðisløgnin skuldi bera heiti M. A. Jacobsens varð hildið, vegna tess, at hesin borgarstjóri, meiri enn nakar annar, hevði studlað føroyskar bókmentir.

Ólavur Michelsen nevndi, at hækkingin til 3000 kr. var kanska ikki so stór, tí nú var virðin drúgv tíð, síðan virðisløgnin av fyrstan tíð varð latin. Hon var tá, sum áður sagt 1000 kr., og nú eru liðin fjúrtan ár síðan.

Ólavur Michelsen helt eisini, at ov lítið varð gjørt fyri ungdómin á tí mentunarliga økinum.

— Uppskot mítt um at seta eina ávísa upphædd á figgjarlógina til fríðkingar av býnum og til mentunarendamál vann ongan frama á sinni. Sjálvandi ber hetta ymist í sær, men verður hugsað um skattin, so vildi eg hildið, at borgararnir vildu goldið tær fáu krónurnar til hesi endamál við gleði, segði Ólavur Michelsen.

— Málið varð beint aftur í kassanevndina til viðgerðar.

Í samband við eitt mál um gerð av R. C. Effersøesgøtu frá Bøkjarabrekku niðan til Jan stovugøtu, tók Kjartan Mohr orðið og segði, at hann kendi seg sviknan, vegna tess, at eitt uppskot frá honum um gerð av m. a. Argjavegnum og Velbastaðnum ikki hevði verið við gjørt samstundis á nevndarfundinum.

Hann helt at tað var rímiligt at hesir vegir vóru gjørdir samstundis, so at sloppið kundi verða undan hesum »lappingunum«, ið tikið var til.

Býráðsformaðurin Petur Christiansen segði, at uppskot Kjartan Mohrs um gerð av m. a. Argjavegnum og Velbastaðvegnum vóru farin í teknisku nevnd til viðgerðar, tí henda nevndin skuldi kanna hesar vegir og síðan leggja eina kostnaðarætlan fyri kassanevndina.

Sofus Sivertsen formaður í teknisku nevnd segði, at vegirnir verða gjørdir, tá teknikararnir eru lidnir við arbeiði sítt.

Kjartan Mohr segið síðan, at hann mátti krevja, at tekniska nevnd hevði tilmæli um vegirnar á komandi býráðsfundi, og heitti samstundis á Sofus Sivertsen um at skunda undir teknikararnar, til tess at fáa vegirnar gjørdar.

Ólavur Michelsen tók undir við Kjartan Mohr (kanska er hetta ikki so ofta), at royndirnar at gera nakrar einstakar vegir, stutt framman undan vali, fóru nevvan at eydnast, men vildi harímóti skjóta upp, at lán vórðu fingin til vega, at flestir vegir í Havnini kunnu verða gjørdir.

Óli Frits Jacobsen segði, at tekniska nevnd fór at drála við teimum vegum, ið Kjartan Mohr hevði skotið upp at verða gjørdir, tí hann kendi formannin í teknisku nevnd

Tilráðingin, ið elvdi til orðaskiftið ,var annars henda:

Mál viðv. gerð av R. C. Effersøesgøtu frá Bøkjarabrekku niðan til Janstovugøtu sambært uppskotið til 1. etapu, t.v.s. við koyrivegabreidd í 7,5 m og við so breiðum gongubreytum í báðum bordum sum til ber, t. v. s. upp til 2,5 m.

Arbeiðið er sambært kostnaðarætlan mett at kosta o. u. 150.000 kr.

Tekniska nevnd mælir býráðnum til at samtykkja, at nevnda arbeiðið verður gjørt, og at lán uppá 150.000 kr. verður útvegað.

Smtykt at mæla býráðnum til at samtykkja tilráðingina frá teknisku nevnd.

Samtykt við 9 atkvøðum.

Mál viðv. beining av Dalagøtu oman í Varðagøtu (beint eystanfyri húsini hjá Mortani Holm Carlsen og sunnanfyri hjá William Heinesen).

Arbeiðið er sambært kostnaðarætlan mett at kosta o. u. 100.000 kr.

Tekniska nevnd mælir býráðnum til at samtykkja, at omanfyri nevnda arbeiði verður gjørt og at lán uppá 100.000 kr. verður útvegað.

Samtykt at mæla býráðnum til at samtykkja tilráðingina frá teknisku nevnd. Samtykt.

Mál viðv. høvuðsumvæling av Hvarvinum sambært vatnsýnisnevndarúrskurðin og gerð av einum vegstubba frá Persskonugøtu til húsini hjá Óla Ljósheim.

Sambært kostnaðarætlan er høvuðsumvælingin mett at kosta o. u. 135.000 kr. og gerð av vegstubbanum o. u. 15.000 kr.

Tekniska nevnd mælir býráðnum til at samtykkja, at omanfyrinevndu arbeiði verða gjørd og at lán uppá 150.000 kr. verður útvegað.

Samtykt at mæla býráðnum til at samtykkja tilráðingina frá teknisku nevnd tó við tí uppískoti, at vegstubbin til Óla Ljósheim verður gjørdur samsvarandi útstykkingarætlanini fyri matr. nr. 912 b o. fl. og í samráð við Gunnar Hoydal.

Samtykt við 9 atkvøðum.

Tilráðing frá býarplánsnevndini

Umsókn frá Leif Waagstein, lrs. fyri Niels L. Arge viðv. avlesing av servitutti, ið er tinglisin á matr. nr. 722 b.

Nevndin samdist um at mæla býráðnum til at samtykkja at servituttur tinglisin frá matr. nr. 722 nr. 1 verður varðveittur, meðan nr. 2 verður strikaður, at servituttur tinglisin frá matr. nr. 723 a, nr. 1 verður varðveittur, meðan nr. 2 og 3 verða strikaðir og at servituttur, tinglisin frá matr. nr. 723 c nr. 1 og 2 verða strikaðir.


Málið varð samtykt við 9 atkvøðum.

john.—

Framhald frá 1. síðu (3)

er flutt út á 12 fjórðingar, hóast talið á veiðuførum sum reka heimaútróður er munandi vaksið og hóast tað, at hvør bátur setur munndi longri línu nú enn tá, so útgjørdi tað sum veitt varð undir Føroyum í 1970 ikki meira enn sløk 16 pst. av samlaðu veiðini, ímóti 21 pst. í 1961.

Vit vísa annars til oddagrein á síðu 2.



Telefon 1225
Telex 21

Skip	Úr Københavnn	Úr Aalborg	Úr Halmstad	Úr Leith	Í Føroyum
BLIKUR	20.10.	17.10.			23.10.
RAVNUR ...		17.10.	18.10.		23.10.
LÓMUR	27.10.	24.10.			30.10.
HEYKUR		27.10.		30.10.	1.11.
BLIKUR	3.11.	31.10.			6.11.
RÓKUR		31.10.	1.11.		7.11.
LÓMUR	10.11.	7.11.			13.11.
RAVNUR				20.11.	22.11.

RAVNUR fermir í Drammen 21. oktober.
RÓKUR fermir í Drammen 3. november.
RAVNUR fermir í Delfzijl, Hollandi 17. november.

P/F SKIPAFELAGIÐ FØROYAR

FK

TÓRSHAVN
KLAKKSVÍK
FUGLAFJØRÐUR

Tilboð í 44. viku 23.10.–28.10.

Gerið nýtslu av okkara síðsta tilboðið uppá bógvar frá seinasta heyst.

Verður selt út nú fyri bert kr. 8,00 pr. kg.

GÓÐAR PURRUR pr. stk. 1,00
Bunti við 10 stk. bert 7,50
GULARØTUR I 1 kg posar
pr. posa 3,50
3 posar bert 8,00
(Avsláttur 2,50)

Purrur og gularøtur fyrst tá ið skipið er komið.

Føroya Keypssamtøka
har, ið peningurin røkkur longst

UMBOÐ:
LÍVSTRYGGINGIN
BRUNATRYGGINGIN
VEGLEIÐING um TRYGGINGAR FÆST FRÁ
VANLUKKUTRYGGINGIN
TRYGGINGARSAMBANDIÐ
KJARTAN DALSGAARD
ferðandi tryggingarmaður
á Tórgarði - Tórshavn
Telf. 12940